# Bárður Johannesen, sum spældi sín síðsta dyst fyri B71, hevði ikki stórvegis trupulleikar av atsøknunum hjá B68




*B71 liðskiparin, Símin Hansen, slóð til í sístu løtu, og ognaði sandingum ein sera týdningarmiklan sigur.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Leðusveinurin, Bárður Johannesen hevur eydnast væl hjá B71*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



spælstýrandi í fyrra hálvleiki, so løgdu sandoyingar meira fyri eftir steðgin. Hetta hevði við sær at bæði liðini stríddust fyri at fáa takið á dystinum, men eins og í fyrra hálvleiki gjørdist talan um ein rótutan dyst. Tó so til tíðir vístu sandoyingar góðar taktir og komu fram til rímiligar kjansir, meðan gestirnir høvdu onkra naska roynd eftir deyðbóltstøður.

Fáar minuttir fyri dystarlok fekk B68 ein gyltan kjans, tá Pól Jóhannus Justinussen kom einsamallur móti B71 málinum, men skotroyndin hjá honum fór fram við málinum. Misbrúkti kjansurin hjá gestunum skuldi vísa seg at vera dýrur, tí løtu seinri lá bólturin í B68 málinum, eftir at Símin Hansen í stríði við ein verjuleikara fekk tamt bóltin og prika hann framvið málverjanum og í málið.

## Misbrúkti kjansurin hjá gestunum skuldi vísa seg at vera dýrur, tí løtu seinri lá bólturin í B68 málinum

Sostatt vann B71 ein sera týdningarmiklan sigur á B68. Ein sigur sum hevur við sær at sandoyingar koma vekk frá aftasta plássi, samstundus sum toftamenn eru blivnir partur av botnstríðnum.

post@sosialurin.fo

## Símin Hansen:

# Sigurin hevur alt at siga fyri okkum

*Segði ein fegin Símin Hansen tá Sosialurin fekk orðið á hann eftir dystin.*

*– Tað kennist sera gott at vinna dystin, ikki minst tí talan var um ein sera javnan dyst sum kundi farið báðar vegir, men har vit fáa drigið sigurin í land í síðsta minutti, segði málkjúttin hjá sandoyingum.*

*Spurdur um týdningin av sigrinum, sigur Símin Hansen, at sigurin á B68 er av alstrórum týdningi, og vísir á at nú er B68 partur av botnstríðnum, og skal B71 yvirliva í bestu deildini, so skulu teir vinna á hinum botnliðunum.*

*– Sigurin á B68 gevur okkum sjálvsálit, og tað kunnu vit taka við okkum til næsta dyst, sum verður móti AB á heimavølli, sigur Símin Hansen at enda.*